## Kostfakligt starvsfólk til Køkin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi

Søkt verður eftir einum dugnaligum og arbeiðssomum kostfakligum starvsfólki til setan í farloyvisstarv.

Setanin er frá 1. desembur 2020 ella eftir avtalu, til 30 novembur 2021. Starvið er eitt fulltíðarstarv og arbeiðstíðin er frá kl. 7.00 til 15.00. Vikuskiftisvaktir eru 3. hvørt vikuskifti.

Brennur tú fyri at gera góðan og føðslurættan mat, so er tað møguliga tær, vit leita eftir.
Vit gera mat og máltíðir til eina sjúklingadeild, borgarir á røktarheimi og sambýli, heimabúgvandi pensionistar, starvsfólkakantinu, fundir og annað virksemi í húsinum.

**Arbeiðsuppgávur í høvðusheitum:**
Matframleiðsla, fyrireiking, planlegging, pakking, upprudding, fremja innaneftirlit, uppvask og reingerð.

**Førleikar:**

- tú ert føðsluatstøðari (ernæringsassistent) ella hevur líknandi útbúgving
- tú dugir at samskifta í skrift og talu
- tú hevur kt-førleika á brúkarastøði
- tú hevur arbeiðsroyndir frá stovnskøki

**Persónligir eginleikar:**

- tú ert álítandi og ábyrgdarfull/ur
- tú hevur ein hugburð, sum stuðlar undir góðum arbeiðsumhvørvi og trivnaði
- tú sært møguleikar framum forðingar
- tú hevur gott yvirblikk og tolir stórt arbeiðstrýst
- tú ert samstarvssinnað/ur og jalig/ur
- tú ert røkin og arbeiðssom/-samur
- tú ert tænastusinnað/ur og fyrikomandi
- tú ert fleksibul og tolir broytingar

Vit bjóða ein fakligan spennandi gerandisdag saman við dugnaligum og fittum starvsfelagum, har tú kanst fáa ávirkan á menningina av tænastuni hjá køkinum. Eisini bjóða vit eitt arbeiðspláss har tað er vítt til veggja og rúmd fyri nýhugsan og nýskapan.

**Løn og setanartreytir** smb. sáttmálanum millum Kost- og føðslufelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at venda sær til Elisabeth Akursmørk, leiðara í køkinum, á telefon 404581/ 229229 ella á teldupostadressu: elisabethak@ks.fo

**Umsóknarfreistin** er 12. novembur 2020

**Umsókn við CV og prógvum skal sendast við telduposti til: umsokn@ks.fo**

Á okkara heimasíðu www.ks.fo kanst tú lesa um Klaksvíkar Sjúkrahús.